# Soleiðis er

**Útvarpsleikurin "Soleiðis er" hjá Steinbirni B. Jacobsen varð skrivaður í 2002, men kemur nústaðni út í bók.**




Útvarpsleikurin "Soleiðis er" fer fram í nútíðini, men nertir eisini við æviga evnið, deyðan. Útgávan er eitt minni um, at tað nú eru 40 ár síðani at Steinbjørn gav út sína fyrstu bók "Heimkoma". Hann hevur sjálvur útgivið fýra bøkur við sjónleikum og útvarpsleikum, henda verður sostatt tann fimta, meðan Fanni hevur útgivið tvær bøkur.

- Hóast ongir útvarpsleikir verða sendir longur, ber jú tenn sum áður væl til at lesa leikir, og tað innan sum uttan skúla gátt, sigur Steinbjørn B. Jacobsen.

**rd**

# Jólaboð

**Nú er jólablaðið Jólaboð, sum KFUM í Havn gevur út, komið í bókabúðirnar**




Í jólaboðum er hópin av siðsøguligum tilfari, upprunaligar og týddar søgur og yrkingar.

Vit kunnu nevna Jógvan Ingvard Olsen er á floti við abba-beiggjanum, Sigvald Kristiansen er á ferð í Egyptalandi, Johs. Andr. Næs fer við okkum aftur í tíðina, tá ið farið varð undir sunnudagsskúla í Quillingsgarði í Havn.

John Myllhamar hevur skrivað søguna Víngarðin um Jóanes Og óLuvu og lagnu teirra.

Janus Dam Guttesen hevur teknað tekningarnar í blaðnum. Kápumyndin er av Áarvegnum í 1930'árunum.

Guttorm Zachariasen hevur lagt Jólaboð til rættis. Blaðið er 80 síður og kostar 90 krónur.

**rd**


Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Heimatænastuna Sandoyar Øki

**Søkt verður eftir:**
- einum sjúkrarøktarfrøðingi til barnsburðarfarloyvisstarv
- einum heilsurøktara í eitt 1 ára farloyvisstarv
- einum heilsurøktara ella heilsuhjálpara til fast starv.

Størvini vera at seta skjótast tilber, ella eftir nærri avtalu.

**Vit søkja eftir fólki:**
- við røktarfakligum royndum at arbeiða bæði inni á stovni og úti í Heimatænastuni
- sum hava hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- sum hava hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagar, lesandi og næmingar

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við skiftandi avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

**Lønartreytir:**
Lønin verður ásett eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Ásu Davidsen, økisleiðara, á telefon 36 17 49 ella 21 38 90.

Umsókn við avriti av autorisatión, prógvi v.m. skal sendast til:

Heimarøktin Sandoyar Øki
Stílað: Ása Davidsen, økisleiðari
Áargarður
210 Sandur

**Umsóknarfreistin er 18. desember 2006**

Les meira um størvini á www.naerverk.fo

*Heimatænastan Sandoyar Øki er ein skipan, har heimatænasta, røktarheims- og sambýlisrøkt og rakstur er samskipað. Í økinum eru tríggir stovnar; eitt sambýli í Skopun, eitt røktarheim á Sandi og eitt sambýli í Skálavík, har fólk við sjúkuni demens í mestan mun verða visiterað. Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuhjálparar starvast bæði á stovnum og úti í Heimatænastuni.*

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið á Bárðarfløtti, Vágur – farloyvisstarv

Søkt verður eftir einum pedagogi í farloyvisstarv til Sambýlið á Bárðarfløtti. Setan frá 01.01.2007 til 31.12.2007 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

Sambýlið á Bárðarfløtti er heim hjá 5 fólkum við menningartarni.

Tann, ið settur verður, skal vera sálarliga og likamliga væl fyri, skal verða førur fyri at taka tær avbjóðingar, sum koma, og vera opin fyri nýhugsan. Haraftrat er neyðugt at duga at arbeiða sjálvstøðugt, samstarva við aðrar fakbólkar umframt at kunna taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðnum.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið er eitt sáttmálasett pedagog-starv, sum verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.
Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.
Um eingin pedagogur søkir, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sátttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til leiðaran á stovninum á tlf. 374074.

**Umsókn**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:
Sambýlið á Bárðarfløtti
Stílað: Elken Holm, leiðari
FO-900 Vágur

**Umsóknarfreistin er 18. desember 2006.**

Les meira um størvini á www.naerverk.fo

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo


# Martin Joensen kemur við savnsútgávuni "Lat meg gloyma teg"




Martin Joensen hevur yrkt, teknað, málað og skrivað løg, síðan hann var um 18 ár. Nú er hann 53 ár. Hesi 35 árini er nógv fint tilfar komið frá honsara hondum. "Lat meg goyma teg" er eitt úrval av teimum bestu yrkingunum. Pauli Hansen hevur skrivað nótar til øll løgini og í einum lumma á bakinum er nýggj savnsfløga við teimum bestu sangunum hjá Martini Joensen.

Bókin er 200 síður og gjøgnumlitað við teimum bestu skitsunum og málningunum eftir Martin Joensen. Bók og fløga kosta 330 kr


Stórt úrval av leysamotorum.
Ring til okkara!




STUBBIN
Fjarðarvegur 12, 350 Vestmanna
Tlf. 471 800 / 218 540